DÓTTIR SKAMMARANS II: GÁVA ORMSINS

Brynhild Sjúrðardóttir Meitil, 14 ár
UMMÆLIR FILM

SSSS

Gáva Ormsins er næsta útgáva í røðini um Dóttir Skammarans. Lene Kaaberbøl hevur skrivað fýra bøkur, og nú eru tvær gjørdar til film. *Dóttir Skammarans – Gáva Ormsins* er um eina gentu, sum eitur Dina. Dina hevur evnir at síggja, hvat fólk skamma seg yvir. Í filminum verða beiggi Dinu og Nicodemus tiknir til træl av hermonnunum hjá Drakan, tí ónda í søguni. Nicodemus er rætti arvingi av Dunark-ríkinum, men Drakan hevur tikið tað frá honum. Dina fer so at biðja pápan um hjálp, men mamma Dinu sigur, at hon skal halda seg vekk frá pápanum, tí hann dugir svartan gand, gáva ormsins. Dina fer so allíkavæl við pápanum at bjarga Nicodemusi og beiggjanum. Dina finnur so útav, at hon eisini hevur gávu ormsins.

Eg haldi, at filmurin er spennandi og góður. Spennandi at síggja, hvussu Dina og pápin brúka sínar gandakreftir. Í filminum er eisini nakað av harðskapi og óndum kreftum, sum ger filmin meira spennandi.

Eg gleði meg til triðja bók verður gjørd um til film.

The Crimes of Grindelwald

Gunnvá Winther, 13 ár
UMMÆLIR FILM

SSS

Filmurin er annar partur av Fantastic Beasts-røðini. Filmurin byrjar við, at Grindelwald flýggjar frá MACUSA (Magical Congress of The United States Of America). Newt Scamander fær eina uppgávu frá Dumbledore og fer til París, har tað mesta av filminum gongur fyri seg. Við sær hevur hann beiggja sín Theseus og unnustuna hjá honum, og gomlu vinkonu sína Letu Lestrange. Tina Goldstein er eisini har, men hon hevur eina aðra uppgávu. Hon skal finna Credence Barebone, ið arbeiðir í einum sirkusi. Tað mesta av filminum er ein blanding av afturlitum til skúlatíðina hjá Newt og Letu, høvuðspersónunum, ið ganga og mala í París, Credence, ið leitar eftir familjuni hjá sær, og Grindelwald, ið ikki ger serliga nógv ólógligt – so navnið á filminum passar ikki heilt til innihaldið. Filmurin er ikki vánaligur, men hann er ikki super góður heldur. Eg haldi eisini, at mann kundi strikað hendan filmin og heldur koyrt eini tjúgu minuttir eyka á tann næsta filmin, sum kemur í 2020. Tann besta lýsingin, eg havi hoyrt av filminum, er Fantastic Beasts 3 Official Trailer: The Movie.

Bumblebee

Róaldur A. Dalsgarð, 13 ár
UMMÆLIR FILM

SSSSSS

Bumblebee er ein undanfilmur (prequel) til Transformers-filmin frá 2007. Søgan fer fram í 1987. Autobotturin Bumblebee krógvar seg í einum bilkirkjugarði í einum lítlum býi í Kalifornia í USA. Charlie verður skjótt 18 ár, og hon ynskir sær ein bil, og á bilkirkjugarðinum er ein lítil, gulur Volkswagen. Hon fær bilin, og tá ið hon fer at arbeiða upp á hann, finnur hon út av, at hann er gamla krígsmaskinan b-137 ella Bumblebee. Tey verða vinir, og saman skulu tey royna at verja heimin móti teimum óndu Decepticons, til restin av autobottunum koma til jørðina.

Samanborið við gomlu Transformers-filmarnar er hesin filmurin rættiliga nógv øðrvísi. Her er ein 'verulig' søga og ikki bara enn eitt kríggj, sum skal vinnast. Og tað dámar mær væl og ger, at eg vóni, at tað koma fleiri Transformers-filmar sum hesin. Sum flest aðrir action-adventure-filmar er hann bæði stuttligur og spennandi. Har eru nógvar kular effektir og feitur 80-ara tónleikur.



Miljuløtur

Birta Janusardóttir Hansen, 10 ár

UMMÆLIR BÓK

SSSSSS

Søgan snýr seg um eina gentu,sum fortelur um lív sítt. Genten eftur Milju, og hon býr í Port Januo. Vit fylgja Milju og hoyra um lív hennara, frá hon er 7 ár, til hon er næsten 12 ár. Søgan hoppar frá ymiskum løtum í lívinum hjá Milju.

Eg hugsi, tá íð eg lesi bókina, at hetta kundi verið veruligt, og hetta kundi verið ordiligu lívið hjá Milju, og tað ger søguna spennandi.

Evnið í bókini er vindlag millum bæði gentur og dreingir. Milja er besti vinur við nábúgvan hjá sær, sum er ein drongur. Hann flytur avstað, og so fær Milja ein nýggjan vin, tá íð hon byrjar í skúla. Tað er stuttligt at lesa um, hvussu Milja og vinir hennara lva sini liv.

Hendan bókin minnir meg ikki um nakra aðra bók, sum eg hevi lisið.

Mær dámar sera vel bókina, hon var so spennandi at lesa.

STINKAR ★☆☆☆☆☆

FINN OKKURT BETRI AT BRÚKA TÍÐINA TIL ★★☆☆☆☆

IKKI SO GALIÐ ★★★☆☆☆

Guðrið Egholm, 17 ár
UMMÆLIR

★★★☆☆☆



ELDFØRIÐ

Otto Hundebiss er hermaður og hevur einki eftir at missa. Hann ger av at bjóða deyðanum av. Hann møtir Safire og vil gera alt tað, hann er mentur fyri at sleppa at vera saman við henni. Men mangt fordar honum at fáa tað, hann vil. Til dømis er allur býurin skjótur at skuldseta hann, fremmandamannin, fyri brotsverk, sum hann ikki hevur gjort.

Hetta ævintýrið er um gand, ondskap, vákurleika, kærleika, og hvussu langt mann kann fara fyri at sleppa at vera saman tí, ið mann elskar.

Gandur hevur ein stóran leik í ævintýrinum og vísir bæði hvørjar fyrimunir og hvørjar avleiðingar gandur kann hava við sær, og at mann má ansa eftir, hvat mann vynskir sær.

Bókin er spennandi, góð og prýdd við vokrum og ohugnaligum myndum. Endin er góður og letur lesaran málleysan eftir.

Tær báðar fyrstu bøkurnar í Kepler62-røðini eita Innbjóðingin og Niðurteljing.

NÝGGJ SPENNINGSRØÐ: KEPLER62

Tær báðar fyrstu bøkurnar í nýggju sci-fi-spenningsrøðini Kepler62 eru júst komnar út á føroyskum

Er naka har úti?

Í bókunum verða nøkur børn og ung send út á eina vandamikla ferð til eina ókenda gongustjørnu. Tað eru myndugleikarnir, sum senda tey av stað, men eru hesir myndugleikar bara góðir? Og hví verða tey í grundini send út í rúmdina?

Eftir at tann finski rithøvundurin, Timo Parvela, hevði hoyrt norska rithøvundan Bjørn Sortland lesa upp á einum bókafestivali, spurdi hann Bjørn, um teir ikki skuldu fara at skriva eina bókarað saman. Afturat sær fingu teir Angry Bird-teknaran, Pasi Pitkänen, og saman planløgdu teir alla røðina, sum eftir ætlan verður til seks bøkur.

– Eg haldi, at tankin um at ferðast út í rúmdina at leita eftir eini aðrari gongustjørnu at búseta seg á, er bæði kul, spennandi og rættiliga óhugnaligur, sigur Bjørn Sortland. – Ungdómurin í bókunum sleppur rættiliga at royna seg. Tey fara ikki bara frá familju og vinum, tey vita heldur ikki, hvønn tey kunnu líta á, og einki er, sum tað sær út til at vera.

Um Keler62

Náttúrutilfeingið á Jørðini er um at ganga undan, og myndugleikarnir gera tí av at senda ein bólk við ungdómum út í rúmdina at finna eina gongustjørnu, ið minnir um Jørðina, og sum mann kann búgva á. Børn verða testað við telduspælinum Kepler 62. Tey, sum klára spælið, sleppa víðari til eina venjingarlegu, men bara nøkur heilt fá sleppa við á ferðina.

Tær seks bøkurnar í Kepler 62-røðini taka lesaran við á spennandi rúmdarferðir. Tey ungu verða niðursetufólk, tá ið tey koma til gongustjørnuna Kepler 62e, og tey eru fyri krevjandi avbjóðingum: Eru rúmdarverur har? Ber til at yvirliva á gongustjørnuni? Og hví vóru tey í grundini send avstað?

Hvat er Kepler 62 í veruleikanum?

Kepler 62 er ein verulig sólskipan, ið er um 1.200 ljósár burtur. Í sólskipanini eru ein sól og fimm gongustjørnur, sokallaðar eksoplanetir. NASA hevur kannað sólskipanina og funnið út av, at tvær av gongustjørnunum, Kepler-e og Kepler-f, møguliga eru í passaligari fjarstøðu frá sólini til, at har kann vera vatn, luft og lív.

SPØL TØKNI FILMAR BØKUR TÓNLEIKUR MATUR SPØL TØKNI FILMAR B

Falska Rósan

Ranja Eir Gudmarsdóttir, 13 ár
UMMÆLIR BÓK

SSSSS

Sally Jones er nú aftur í eini nýggjari bók. Tann triðja bókin í røðini, sum eitur Falska Rósan, er minst líka góð sum hinar báðar.

Sally Jones og Chiefurin eru enn í Lissabon og umvæla skipið Hudson Queen. So kemur eitt tivoli til býin, og við er ein maður við einum óhugnaligum, blindum hana. Ein dagin skal Chiefurin mynstra við einum dampara til Brasil, og so er Sally Jones einsamøll eftir við bátinum. Tann sama dagin, sum Jones kemur heim aftur til skipið, er ein lepi har frá manninum. Hann hevur verið umborð á bátinum. Men hvussu var hann komin inn? Og hvussu hevði hann fingið fatur á einum lykli?

Hetta er ein góð bók. Eg mátti lesa nokk so nógvar síður, áðrenn hon bleiv spennandi, men aftan á tað var hon ógvuliga góð. Bókin er eitt sindur long, og tað tekur eina góða løtu at lesa hana. Mær dámdi væl, at har vóru fleiri stød, har eg sjálv noyddist at hugsa eitt sindur fyri at skilja tingini betur.

Bókin er sera væl skrivað og sett upp. Har eru myndir, hvørja ferð ein nýggjur kapittul byrjar, og bókin er deild upp í fimm partar.



Eg haldi, at øllum, sum dámar væl spenningsbøkur og bøkur, sum eru eitt sindur langar, hevði dámt hesa bókina. Hon er góð og spennandi, og eg gevi henni fimm av seks stjørnum.



Hvat dámar tær at lesa?

Eru tað spennandi søgur, ræðusøgur, skemtisøgur, krimi, ævisøgur, søgur frá veruleikanum ella okkurt annað? Jóna og Olivia eru systrar og elska at lesa. Hoyr, hvat tær siga um lesing, og fá góð lesiprei frá teimum

Jóna Reinert Joensen

10 ár

– Mær dámar væl at lesa, tí so hevur man altíð okkurt at gera, og tað er hugnaligt og spennandi at lesa. Mær dámar eisini væl, tá onkur lesur fyri mær

Mær dámar væl at lesa spenningssøgur, teknirøðir og fantasy. Eg elski, tá tað er ein rød av bókum. Mamma las tríggjar tær fyrstu Harry Potter bøkurnar fyri mær, men tær vóru so spennandi, at eg kláraði ikki at bíða, so eg las tær seinastu sjálv, tó at mamma las onkran kapittul fyri mær. Vit hugdu eftir filmunum so hvørt, sum vit høvdu lisið bøkurnar, men bøkurnar eru nógv betri, tí tær hava nógv fleiri detaljur.

Nakrar bøkur, eg kann viðmæla, eru: "Hvíti fuglur" eftir R.J. Palacio, sum er framhald av bókini "Undur", "Gangstara omman" hjá David Walliams, hon er ordiliga stuttlig, "Harry Potter" 1 -7 eftir J.K Rowling, røðin um "Dóttir skammarans" eftir Lene Kaaberbøl, "Náttarskrímslið", "Skrímslið og menniskjuni" og "Skrímslið í sirkus" eftir Mats Strandberg og Sofia Falkenheim og "Rýmingarnir" eftir Ulf Stark.

Jóna

IKKI SO GALIÐ
SSS

GOTT
SSSS

FÍNASTA SLAG
SSSSS

HEILT ÓTRÚLIGT
SSSSSS

– Nú lesi eg "Skammarateknið", sum er tveyarin í røðini um Dinu, dóttir skammarans. Eg lurtaði eftir fyrstu bókini í barnaútvarpinum, men eg klaraði ikki at liða, so eg lænti hana á bókasavnínum og las hana, áðrenn tey lósu hana lidna í barnaútvarpinum, sigur Jóna

Olivia Reinert Joensen

12 ár

– At lesa er tað, sum eg tími allarbest. Eg elski at lesa! Mær dámar best at lesa føroyskar bøkur, men tað er eisini gott at lesa enskt og danskt.

– Mær dámar best spennandi fantasybøkur, sum eru eitt sindur romantiskar. Og mær dámar best, tá tað er ein rød av bókum, tí tá ein finnur eina ordiliga góða bók, so veit man, at tað eru fleiri líka góðar bøkur.

– Eg havi til dømis lisið røðina um Harry Potter og Skýmingarsøgur (Twilight sagaen), men har vóru bara tvær tær fyrstu bøkurnar á føroyskum, tí las eg restina á donskum. Tær eru nakrar av teimum bestu bókunum, eg havi lisið, umframt "Eg, Coriander", røðin um Hungursleikirnar og "Kjarr".

– Eg hevði ynskt at havt onkra vinkonu, sum las líka nógv sum eg, tí eg elski at tosa um tað, sum eg lesi, sigur Olivia

Tá eg varð rænd aðru viku í juni

Ingrid í Stórustovu, 13 ár
UMMÆLIR BÓK

SSS

Eg havi lisið bókina, "Tá eg varð rænd aðru viku í juni", sum er ein barna-/ungdómsskaldsøga eftir Siri Kolu, ið júst er týdd til føroyskt.

Bókin snýr seg um 10 ára gomlu gentuna Vígdis, sum enn eina ferð skal halda summarfrí hjá ommu síni, og tað tímir hon sera illa. Men hesa ferð hendir nakað heilt annað. Í bilinum ávegis til ommu sína, koyrir ein ránsmannabilur skjótt framvið og forðar teimum í at koyra víðari. Ránsmenninir leypa út og ræna bilin hjá Vígdis og familju hennara. Teir taka alt møguligt, sum t.d taskur, pungar, sólbrillur og nógv annað. Alt ránið gongur so skjótt fyri seg, og teir kvika sær so nógv, at teir av óvart og uttan at leggja merki til tað eisini ræna Vígdis.

Vígdis fær ikki rýmt heim aftur til familju sína, og brádliga er hon vorðin partur av einum ránsmannaliði. Bókin snýr seg so um, at Vígdis livir saman við ránsfólkunum restina av summarfrítíðini, og har upplivir Vígdis mangt og hvat. Somuleiðis lærir hon eisini nógv av teimum, og tey læra nógv av henni. Talan verður um eitt heilt nýtt, øðrvísi og spennandi summar samanborið við tað, sum Vígdis hevði ímyndað sær. Og møguliga verður hetta tann stuttligasta summarfrítíðin nakrantíð hjá Vígdis?

Bókin er 209 síður, og tað er ikki alla tíðina, at tú sum lesari verður undirhildin. Bókin er onkuntíð stuttlig og undirhaldandi, men onkuntíð eisini eitt sindur langdrigin. Samskiftið gongur skjótt fyri seg millum persónarnar í bókini, so bókin er ikki so einføld at lesa, kanska serliga fyri yngri lesarar, ið helst mugu fáa onkran vaksnan at lesa hart fyri sær. Bókin er til umleið 9-12 ára gomul.

Klukkudrongurin

Bartal Páll Klein, 12 ár
UMMÆLIR BÓK

SSSSSS

Bókin *Klukkudrongurin* handlar um Darkus og pápa hansara. Pápin verður brádliga burtur, og Darkus má flyta til Max gubba at búgva. Har hittir hann Berthold og Virginiu, sum gerast hansara bestu vinir. Darkus fer at vitja eina konu, sum eitur frá Cutter, og har heyrir hann málið á pápanum inni í húsinum hjá henni. Hann finnur eisini nakrar klakkur inni hjá grannunum og finnur út av, at frá Cutter ætlar at drepa klukkurnar. Saman við Bertholdi og Virginiu reynir Darkus at bjarga klukkunum og finna pápa sín. Eg haldi, at bókin er góð og spennandi, ikki minst, tá tú tey royna at bjarga klukkunum. Eisini er hon sera stuttlig, og eg haldi, at tey flestu kunnu og áttu at lesið hana.

PAX-bókarøðin

Treysti Heim, 12 ár
UMMÆLIR BÓK

SSSSSS

Í *PAX*-røðini eru 10 bøkur. Åsa Larsson og Ingela Korsell hava skrivað bøkurnar, og Henrik Jonsson hevur myndprýtt. 'Pax' merkir friður á latini. *PAX* eru fantasy-bøkur, sum eru staðsettar í Mariefred í Svøríki. Høvuðspersónarnir eru beiggjarnir Alvi og Viggo, sum koma til eina fosturfamilju í Mariefred, tí mamma teirra er farin til avvenjingar. Teir skulu verja eitt gandabókasavn, og tað fører til nógvar vandamiklar hendingar.

Eg haldi, at *PAX*-røðin er góð, tí at bøkurnar eru bæði stuttligar og óhugnaligar. Mín yndis *PAX*-bók er Mýlingurin, tí hon er mest óhugnalig. Óhugnaligasta veran í *PAX*-røðini, haldi eg, er marran, tí hon plágar fólk í dreymum teirra, til tey verða svøk. Eisini er dreygurin sera óhugnaligur, tí hann drepur bert við at nerta, og mann fær ikki vart seg.

Eg haldi, at Viggo er tann djarvasti og kulasti, men tað er eisini sera farligt at vera hann ...

Mær dámar væl, hvussu *PAX*-røðin endar, men tað fari eg ikki at avdúka her.

Teir máttmiklastu tannáringarnir í 2018

Amerikanska tíðarritið TIME hevur útnevnt tannáringarnar, sum hava havt størstu ávirkanina á heim okkara í 2018. Kennir tú teir?

Greta Thunberg
Veðurlagsaktivistur

15 ára gamla Greta úr Svøríki bleiv heimskend, tá ið hon var í veðurlagsverkfalli í tríggjar vikur áðrenn valið til ríkisdagin í Svøríki í fjør. Hetta gjørdi hon fyri at varpa ljós á keðiligu veðurlagsbroytingarnar. Síðan hava næmingar í øllum heiminum verið í veðurlagsverkfalli eins og hon – eisini her hjá okkum. Um verkfallið sigur Greta Thunberg: – Eg má gera tað, eg kann. Tað er mín moralska skylda.

Rishab Jain
Hjálpt við at viðgera krabbamein

14 ára gamli Rishab hevur uppfunnið eitt forrit, sum kann hjálpa læknum við at viðgera krabbamein. Hann hevur vunnið eina virðisløn fyri sína uppfinning. Hon kann nevnliga hjálpa læknum at zooma inn á brisið, so tað verður lættari hjá teimum at skera krabbameinið burtur.

Kylian Mbappé
Skoraði í HM-finaluni

Einans 19 ára gamli Kylian spældi við franska landsliðnum í fótbólti í HM-finaluni. Har skoraði hann enntá eitt mál. Hetta er fyrstu ferð í 60 ár, at ein tannáringur hevur skorað í eini HM-finalu í fótbólti.

Millie Bobby Brown
Fingið 18 milliónir fylgjarar

Millie er bara 14 ára gomul, men síðan høvuðsleiklut hennara sum Eleven í Netflix-røðini Stranger Things er hon vorðin ógvuliga kend. Hon hevur nú fleiri enn 20 milliónir fylgjarar á sosialu miðlunum og er sostatt ein tann best umtókta unga stjørnan í Hollywood.

Melati Wijsen og Isabel Wijsen
Burturbeina plastik úr høvunum

Systrarnar Isabel og Melati, ávikavist 16 og 17 ár, fóru longu tá ið tær vóru 12 og 13 ára gamlar undir at beina burtur plast úr sjónum. Og tær hava hildið fram líka síðan. Í 2018 skipaðu tær fyri størstu uppruddingini á Bali, har 20.000 fólk hjálptu teimum at savna saman 65 tons av ruski!

IKKI SO GALIÐ
SSS

GOTT
SSSS

FÍNASTA SLAG
SSSSS

HEILT ÓTRÚLIGT
SSSSSS

Alan Walker hevur gjørt hittini „Faded", „Alone" og „All Falls Down"

Nú ferðast Alan um allan heimin at spæla. Hann hevur spælt fyri stórum áskoðarafjøldum saman við heimskendum sangarum sum eitt nú Rihannu og Justin Bieber. Men hann trívist tó best í heimbýnum Bergen.

– Alt byrjaði við telduna í kamarinum hjá mær. Har geri eg framvegis sangir, so ofta eg kann. Munurin er bara, at fyrr sat eg har og droymdi um at verða ein stórur DJ. Nú livi eg tann dreymin.

Kelda: Faceculture

Fall Out Boy: Mania

Guðrið Egholm, 18 ár
UMMÆLIR TÓNLEIK

SSSSSS

Mania eitur sjeynda fløgan hjá amerikanska rokkbólkinum, Fall Out Boy, sum varð stovnaður í 2001. Í Fall Out Boy eru fýra limir við Patrick Stump sum forsangara.

Mania, sum varð givin út 19. januar í ár, er nýggjasta fløgan eftir *American Beauty/American Psycho*, sum kom í 2015. Á fløguni eru 10 electropopp/popprokk sangir, sum bólkurin m.a. syngur á síni konsertferð, sum byrjaði í februar.

Eg veit so lítið um Fall Out Boy. Men eg hoyrdi sangin, *Young and Menace* eitt sindur síðan, og mær dámdi beinanvegin bólkin. Mær dámar væl hetta slagið av tónleiki og haldi, at allir sangirnir eru góðir, tó nakrir betri enn aðrir. Best dámar mær *Young And Menace, Heaven's Gate* og *Wilson (Expensive Mistakes)*.

Drápsmansapan

Jóhanna Súnadóttir Pedersen, 12 ár
UMMÆLIR BÓK

SSSSS

Rithøvundur: Jakob Wegelius
Myndprýðari: Jakob Wegelius
Ása H. Ellefsen týddi



Drápsmansapan (2014) er framhald av bókini, *Ótrúliga søgan um Sally Jones*, men mann skilir hana, hóast mann ikki hevur lisið ta fyrru.

Drápsmansapan er ein mega spennandi bók! Hon snýr seg um at fáa sannleikan um morðið á Alphonse Morro fram. Frásagnarfólkið er Sally Jones, ein menniskjaapa, sum ikki dugir at tosa, men skilir alt, ið verður sagt. Hon greiðir skrivliga frá eini ótrúligari ferð úr London til Lissabon og víðuri gjøgnum Miðjarðarhavið og Reyðahavið og heilt til India. Hon siglir við ymiskum skipum, og yvirhøvur arbeiðir hon í maskinrúminum. Hennara góði vinur, Chiefurin, verður koyrdur í fongsul í Lissabon, ákærdur fyri at hava myrt Alphonse Morro, og so má apan klára seg sjálv. At Chiefurin verður ákærdur fyri hetta morðið, er atvoldin til heitið á bókini, tí nú er apan vorðin apan hjá einum drápsmanni.

Men apan veit betur, tí hon kennir sannleikan um hetta morðið.

Á ferðini upplivir hon nógv, og hon hittir nógv ymisk fólk, bæði góð og ónd. Fremst í bókini eru myndir av teimum týdningarmestu fólkunum, sum hon møtir á leiðini. Ein teirra er konan, Ana Molina, ið er ordiliga gestablíð. Hon lovar apuni at búgva og sova hjá sær. Áðrenn apan fer at búgva hjá Anu Molinu, býr hon einsamøll á tekjum í Lissabon. Ein annar, sum hon møtir, er Geoff Gerrard, sum er fittur í fyrstani, men hann svíkur apuna og selur einum øðrum manni apuna. Hesin selur einum triðja manni í India apuna fyri nógvar pengar. Hesin maðurin er maharaja (ein maharaja er ein ríkur fúrsti). Maharajin og apan verða góðir vinir. Eg vil ikki avdúka ov nógv, men í staðin mæla tykkum til at lesa bókina sjálv. Evnini í bókini eru m.a. vinarlag, kærleiki, hatur og svik.

Eg mæli børnum úr 10 árum til umleið 15 ár til at lesa bókina.